
Amnesty-herferðin móti deyðarevsing:

Hví drepa vit menniskju sum drepa menniskju fyri at vísa at tað er skeivt at drepa menniskju?

Eitt sindur um Amnesty International og arbeiði tess — eisini móti deyðarevsing



Tað er skeivt at drepa menniskju. Hetta munnu tey flestu vera samd um.

Hví verða menniskju so dripin eftir lógum? Er tað fyri at vísa, at tað er skeivt at drepa menniskju? Um so er, hví verða fólk so dømd til deyða og tikin av døgum, tá júst tað er skeivt?

Soleiðis hevur onkur orðað spurningin um hetta at taka fólk av døgum.

Mótstøða ímóti morðum av øllum slag er beinleiðis í tráð við mannarættindayvirlýsingina hjá Sameindu Tjóðum, og móstøða móti deyðarevsing, pína og aðrari mannminkandi viðferð er ein av grundarsteinunum undir arbeiðnum hjá Amnesty International.

Amnesty International fer tí nú í holt við eina herferð móti deyðarevsing í USA á sama hátt sum herferðir fyrr eru gjørdar móti deyðarevsing í Iran, Irak, Nigeria, Kina, Suðurafrika og Sovjet.

USA fer hinvegin

Tey seinastu nógvu árini hevur í miðal eitt land um árið tikið deyðarevsingina av. Men hesi seinastu árini eru fleiri amerikanskir statir aftur farnir at fremja deyðarevsingina.

Lond taka deyðarevsingina av, tí hon stríðir ímóti tí grundleggjandi rættinum til livið, sum eingin hevur rætt at taka frá nøkrum — líka mikið, hvat viðkomandi hevur gjørt.

Hvørt ár verða eini 20.000 fólk í USA myrd, men vísindaligar kanningar kunnu einki siga, um deyðarevsingin hevur eina ræðandi ávirkan. Men kanningarnar vísa, at eingin munur er hvat morðum viðvíkur í amerikanskum statum, sum hava deyðarevsing, og sum ikki hava deyðarevsing. Í Florida og Georgia vórðu hinvegin fleiri morð framd, tá hesir statir aftur fóru at fremja deyðarevsingina.

Púra ópolitiskt

Amnesty International er ein púra óheftur felagsskapur — politiskt, átrúnaðarliga, ideologiskt og figgjarliga.

Amnesty International arbeiðir fyri: **at** fáa fólk leys, sum sita føst fyri sína trúgv, politisku áskoðan, húðalit, ella sum heild av samvitskuávum. Treytin er tó, at hesi ikki hava framt ella hava eggjað til harðskap av nøkrum slag. **At** allir politiskir fangar fáa eina skjóta og rættvísa sakarmálsviðgerð. **At** deyðarevsing verður avtikin allastaðir, og **at** fangar ikki verða fyri harðskap ella aðrari óndari, ómenniskjaligari og mannminkandi viðferð — ikki bert samvitskufangar, men allir fangar, eisini kriminellir.

Arbeiðssetningurin hjá Amnesty International er orðaður við mannarættindayvirlýsingini hjá ST sum grundarlag, og bólkarnir hjá Amnesty International kring allan heimin arbeiða beinleiðis fyri hesum mannarættindum við ávísum navngivnum fangum, sum felagsskapurin fær at vita um og fær sær vitan um.

Felagsskapurin arbeiðir fyri politiskum fangum í so at siga øllum heiminum.

Fáa høvi nú

Tey, sum vilja stuðla arbeiðnum hjá Amnesty International móti deyðarevsingini í USA, fáa høvi til tað nú. A fleiri almennum støðum verða listar lagdir, sum fólk kunnu skriva undir, og skipað verður eisini fyri øðrum møguleikum at mótmæla.

Tey, sum hava hug at gerast limir í Amnesty International ella hava hug at taka beinleiðis lut í arbeiðnum, kunnu venda sær til Føroya-deildina hjá felagsskapinum, sum hevur skrivstovu á Bryggjubakka í Havn.

Amnesty International
Føroya deild

Rættleiðing til Jón Ellendersen

Um dagarnar hevði Jón Ellendersen grein í einum av bløðunum, har hann framsetur meiningar um ymisk viðurskifti. Greinin viðger skiftivís viðurskifti í øðrum londum, fyri so í næsta petti at reisa ein moraliserandi peikifingur móti ymiskum føroyskum politikarum, flokkum og fjølmiðlum.

Av tí at fingurin er sera óstillur (peikar í ymsar ættir), og tað tí ikki við vissu kann sigast, hvønn tað er, sum Ellendersen peikar móti, kann tað ljóða, sum undirritaði forfylgir Amnesty International (A.I.) og er ein hatursevangelistur, sum tekur undir við dráps-monnum deyðadómum yvir 12 ára gomlum børnum. Ellendersen vísir til Ku Klux Klan, Reagan, Martin Luther King, Gorbatjov og aðrar, hann vísir til jødadráp, nekaradráp o.s.fr.

Beint eftir eina langa makabra svadu tekur Ellendersen soleiðis til:

Beint eftir eina langa

«Hví mótmælir Adolf ikki tá?» citat endað. Fyri at ongin misskiljing skal



Gorbatsjov vil bekjempe religionen

(KS/Anne Gustavsen) Til tross for at Sovjets overhode, Gorbatsjov har fått ord på seg for å være en reformens og liberaliseringens mann, er det på det rene at hans holdninger til religionen er alarmerende. Talsmenn som hevder at de kristne har fått det bedre under Gorbatsjov er kastet blår i øynene.

Til nå har det riktig nok fore-ligget få direkte uttalelser fra Gorbatsjov angående hans holdning til religionen, men ifølge Ropet fra Øst, tok han bladet fra munnen 24. november i fjor. Det skjedde under en tale han holdt til partifolk i Taskkent. Her manet han til «avgjørende og uforsonlig kamp» mot religionen, og krevde opprustning av det ateistiske arbeidet. «Selv den minste religiøse yrring må bekjempes råderikt», sa han. Dermed skulle han vel ganske klart ha tilkjennegitt partiets linje. Den har så visst ikke forandret seg til det bedre!

Det er verd å merke seg at Gorbatjovs harde utfall mot religion under denne talen bare ble referert i den lokale partiavisen, og ble ikke nevnt verken av TASS eller de store landsdekkende aviser. Bladet Ropet fra Øst kommenterer dette fenomenet med at ulike uttalelser sannsynligvis ikke passer inn i det propagandabilde man er i ferd med å bygge overfor utlandet av Gorbatjov som en reformens og liberaliseringens mann. Skulle Gorbatsjov komme til å foreta en kursendring når det gjelder behandlingen av de kristne og annerledestenkende, ville det i tilfelle ikke være resultat av ideologiske konsesjoner, men utelukkende forbi han har funnet det hensiktsmessig å forandre taktikk, skriver Mujion bak Jernteppets organ, Ropet fra Øst.

Sommerturene med M/S «Brand VII» 1987
Vi har ledige plasser til følgende turer:
Påsketuren 14/4 – 20/4: Fra Stavanger/Bergen – Nordfjord
Sverigehusene 11/6 – 29/6: Fra Bergen/Stavanger/Kristiansand
Danmark/Tyskl. 13/7 – 22/7: Fra Bergen/Stavanger/Kristiansand
Nordkapp 22/7 - 1/8: Fra Stavanger/Bergen
Sogn/Trondelag 2/8 – 11/8: Fra Stavanger/Bergen
Ring for plassbestilling og/eller opplysninger snarest.
BRAND VII – ÅNEN NILSEN A/S – TLF. 04-82 43 50
4016 VEIAKAIEN
Vi kommer i konferanse

standast av hesum og av grein Ellendersens sum heild kemur henda rættleiðing:

Eg havi onki samband við Ku Klux Klan og kenni onki til tann felagsskapin, havi heldur ikki nakran kennskap til ella samband við jødadráp, nekaradráp ella deyðadøming av 12 ára gomlum børnum. Heldur ikki havi eg hvørki privat ella alment tikið støðu ímóti A.I. Eg havi ongantíð kallað A.I. kommunistiskt. Vandi er fyri at tygum í roynd tygara at verja A.I., bert skaða henda felagsskaðin. Amnesty International hevur, um málsetningur felagsins skal røkjast til fulnar, brúk fyri at sum flest eru góð við felagsskapin.

Eg havi onki móti nøkrum kommunisti, men eri varin við hvønn felagsskap eg havi við slíkan. Eg eri harður mótstandari av kommunistiska systeminum og av læru (religión) teirra. Ongin, heldur ikki Ellendersen, skal fáa meg at vera við til at gera samhandilssáttmála við eitt ríkisstýri, kommunistiskt ella ikki, hvørs leiðari boðar frá «herðing móti teimum trúgvandi». Hevði áskoðanin á tey kristnu verið óbroytt ella batnað, so tey fingu friari ræsur, so var støðan ein onnur. **Kommunisman byggir á materialismuna og avnoktar andslívið.** Harvið er hon ein læra, ein religión, men ein vranglæra. Kommunisman avnoktar at Jesus Kristus er komin í holdið (úr anda). Ein rættrúgvandi kommunistur er sostatt ein villleiðari. Biblian sigur okkum, at tann, sum biður einum villleiðara vælkomin, **«kemur upp í part við hansara illu gerningum»**. Les 2. johs. bræv 7 - 11.

Tað, sum eg havi sagt og skrivað um ikki at gera avtalu við Sovjet, havi eg sagt og skrivað sum føroyskur politikari. Amerikanskan, suðurafrikanskan eins væl og russiskan politikk havi eg og fari eg at blanda meg uttan um.

Hvar er kæruleikin, um vit, fyri egnan vinnings skuld, skulu menna annað ríkisstýri í **«avgjørende og uforsonlig kamp» mod religionen (teirri kristnu).**

At enda skal eg heita á tygum, Ellendersen, um enn einaferð at lesa áheitan mína á tingmenn um ikki at atkvøða fyri russarasáttmálanum. Hon varð send bløðunum tann 16. februar. Eisini fari eg at heita á tygum, um at lesa hjáløgdu grein úr norska tíðarritinum **Korsets Seier** fyri 27. februar.

Vinarliga

Adolf V. Hansen

Vaskitoy tygara fáa tygum vaskað skjótt og væl hjá okkum!
Vaskaríið í Tróndargøtu
v/ Henry Dóda
Tróndargøta 57 - Tlf. 17214
Postsmoga 1276 - FR-110 Tórshavn
Opið: Mánadag — friggjadag frá 9-19.30
(eisini í døgurðatímanum). Leygardag frá 9-13

Heldur tú ikki **sosialin**?